# Ársfrágreiðing fyri 2007

## Endamálið

Vinnuframagrunnurin varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframagrunn. Endamálið við Vinnuframagrunninum er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframagrunninum varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi, umsitur Vinnuframagrunnurin eisini stuðulsskipan til skipasmíð.

## Árið 2007

Rentuinntøkurnar vóru 2.410.000 krónur í 2007 móti 1.452.000 krónur í 2006.

Vinnuframagrunnurin hevur í 2007 viðgjørt 33 umsóknir, harav 31 umsóknir vóru játtaðar. Í stuðli vóru veittar 6.779.000 krónur, brutto, meðan 935.000 krónur eru afturførdar. Nettostuðulin var sostatt 5.844.000 krónur. Eginognin við árslok var 47.491.000 krónur, herav er stovnsfæið 42.879.000 krónur.

Við árslok 2007 er tøki peningurin 56.084.000 krónur, meðan skyldugur stuðul er 4.136.000 krónur og skyldugt til landskassan er 9.585.000 krónur.




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 1.672 | 1.605 | 1.100 | 2.200 | 1.850 | 8.427 |
| Menning | 158 | 809 | 1.561 | 2.747 | 2.635 | 7.910 |
| Marknaðarføring | 4.567 | 2.487 | 2.000 | 1.734 | 2.263 | 13.051 |
| Aðrar | 100 | 291 | 38 | 90 | 32 | 550 |
| | 6.497 | 5.192 | 4.699 | 6.771 | 6.779 | 29.938 |

